


UMMÆLI
*Kinna Poulsen*



# Ivaleyst

**Framsýningin hjá Rannvá Holm Mortensen hongur sera væl í Listasavni Føroya, - kanska ið so væl, heldur ummælarin, sum í greinini rør framundir, at framúr góða staðsetingin í millum annað háttvirda, gamla salinum, ger áskoðaran varugan við veikleikar heldur enn styrkir í summum av teimum framsýndu verkunum**

Í røðini av serframsýningum hjá limum í myndlistafelagnum (Felagið Føroysk Myndlistafólk) í Listaskálanum, er tað hesa ferð Rannvá Holm Mortensen, ið eigur tørn við framsýning síni, sum lat upp í november, og tað skal sigast beinanvegin, at henda framsýningin er fleiri ferðir áhugaverdari enn seinasta framsýningin í Listaskálanum, sum var norsk og vánalig.

## Bókin

Á sama hátt sum í hinum førunum (til dømis framsýningini hjá Inga Joensen og komandi framsýning hjá Eyðuni av Reyni) hevur Listasavnið givið út eina lítla, prýðiliga bók um listakvinnuna, ið er sum ein myndaskrá til støddar við harðari permu. Tað er Malan Marnersdóttir, sum hevur viðgjørt listakvinnuna í tekstinum, ið er einar seks heilar síður til longdar, men sum tykist longri av tí, at týðingin á donskum og enskum fylgir tí føroyska tekstinum.

Sæð burtur frá hesi heldur ørkymlandi tekstuppsetingini, veita bæði myndir og tekstur í bókini eina nøktandi lýsing av listakvinnuni og hennara menning frá byrjan til í dag, frá ekspressionistiskum royndum til surrealistiskan íblástur. Høvundurin lýsir útvald verk á objektivan hátt í sínum teksti, sum gerst serliga áhugaverdur, tá hon av og á loyvir sær sjálvum at koma framat við kritiskum staðfestingum sum til dømis á síðu 44: "Álvarsemið í *Samskifti* kundi tað sama tikið yvir og gjørt myndina sera patetiska, men tann spælandi samansetingin av myndatøkni, myndevnum og skemti, sum ræður í nøkrum fáum, men týðandi pørtum av myndini, bjargar henni undan tí. Merkingin hjá hesum listaverkum er, at tey eru tilburðir heldur enn eginleikar, úrslit av ávísum gerðum, sum nema við týðandi mál í samtíðini.".

Eg eri fullgreið yvir, at ein tílík stutt presentatión av einum listafólki ikki beinleiðis leggur upp til ein atfinningarsaman tekst, men haldi allíkavæl, at spurningar og ivamál kunnu vera enn áhugaverdari enn svar.

## Patetiskar myndir

Spurningurin er sjálvandi, hvussu nógvur ivi er í verkunum hjá Rannvá Holm Mortensen, sum innihaldsliga tykjast næstan góðvarin í teirra einfeldi, eins og boðskapurin sýnist kensluborin, at kalla patetiskur. Framsýningin inniheldur grafikk, kollasjur, akrylmyndir umframt eina einstaka standmynd.

Áhugaverdar eru tær politisku ella hugsjónarfullu kollasjurnar, meðan teir meira sansaligu akrylmálningarnir tykjast grunnir onkursvegna sum teir hanga fyri

